Álit

í

løgtingsmáli nr. 41/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Avgjøld á f-gass og ávísar rættingar í vørunumrum og øðrum)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 7. november 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9., 13., 16. og 30. november og 6. desember 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Reiðarafelagið, Vinnuhúsið, Búskaparráðið, Landsbankan, landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, Ingilín Didriksen Strøm, og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, seinnu ferð saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

20. oktober 2023 varð kunngerð lýst um, at innflutningur av sonevndum f-gassi skal minka 85 prosent komandi árini.

F-gass eru sterk vakstrarhúsgass. Tað merkir, at tey eru ógvuliga skaðilig fyri umhvørvið. F-gass er felagsheiti fyri ymisk sonevnd *sterk vakstrarhúsgass*, sum innihalda flour.

Hesi vakstrarhúsgass eru týðandi partur av føroyska útlátinum av vakstrarhúsgassi.

Við reglunum verður krav sett um at útskifta f-gass við onnur kølievni, sum ikki eru eins oyðileggjandi fyri veðurlagsskipanina.

F-gass verða serliga nýtt í køli- og frystiskipanum á landi og í flotanum.

Við uppskotinum verður avgjald lagt á innflutning av f-gassi, sum verður brúkt í køli- og frystiskipanum. Tað eru um 1.000 køliskipanir við f-gassi á landi og umborð á føroyskum skipum.

Vit hava eina altjóða skyldu at minka útlátið av f-gassi, eina skyldu,, sum vit higartil ikki hava røkt.

Løgtingið samtykti hin 5. mai 2022, at Føroyar skulu minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 30% næstu 10 árini. Málið skuldi røkkast við 25 átøkum, har f-gass eru ímillum átøkini í orku- og veðurlagspolitikkinum. Kunngerðin um f-gass og avgjøldini á innflutning av f-gassi eru tí liður í at røkka mál Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi.

Tað væntast, at henda skipan fer at minka nýtsluna av hesum vakstrarhúsgassum munandi komandi árini.

Køli- og frystiskipanir á landi og umborð á skipum, sum brúka f-gass, skulu frameftir skiftast út ella tillagast til onnur kølievni, sum ikki eru eins skaðilig fyri veðurlagið.

Við ætlaðu avgjøldunum, ið eisini eru tilmæld í samtykta veðurlagspolitikkinum, fer kostnaðurin á f-gassi at dýrka, sum vónandi vil viðføra, at hetta fer at skunda undir umleggingar til aðrar køliskipanir.

Skal skiftið eydnast væl, er neyðugt at umleggingin er væl fyrireikað. Tí verður skiftistíðin 15 ár at fyrireika og fáa umlagt køliskipanirnar.

1. januar 2024 verður dýrari at innflyta f-gass, men tað ber til at sleppa undan hesum meirkostnaðinum við at leggja um til onnur natúrlig kølievni. Tær skipanirnar eru longu tøkar, og nýtslan er í vøkstri.

Sambært uppskotinum verða avgjøldini á leið á sama stigi pr. kg. av innflutningi sum í grannalondunum, og verða avgjøldini tí ikki kappingaravlagandi í mun til grannalondini.

Ætlanin er, at partar av inntøkuni, sum hetta uppskotið gevur, skal fíggja eina góðkenda innsavningar- og burturbeiningarskipan fyri f-gass, sum IRF ætlandi fer at umsita. Endamálið við hesum er at tryggja, at brúkt f-gass ikki verður latið út í luftina.

Harafturat verða við uppskotinum gjørdar nakrar rættingar til skjal 1 í løgtingslógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi eftir tilmæli frá TAKS.

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hevur boðað nevndini frá, at Fíggjarmálaráðið er vorðið varugt við eitt mistak, sum er komið í frumskjal 1 til toll- og vøruskránna, sum er í skjali 1 í løgtingslógini, og hevur tí mælt nevndini til at gera eina broyting í lógaruppskotinum.

Í hesum sambandi setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í skjali 1, Frumskjal 1 til toll- og vøruskránna, verður í kap. 22 punkt avgjaldið á “180,00 kr. pr. ltr.” fyri vørunummur

2206.00.31
2206.00.39
2206.00.51
2206.00.59
2206.00.81
2206.00.89
2206.00.90

broytt til: “180 kr. pr. litur reint alkohol.”.

Viðmerkingar

Fíggjarmálaráðið hevur sent nevndini uppskot til broytingaruppskot, har gjørt verður vart við, at í galdandi løgtingslóg nr. 19 frá 12. mars 2002 um avgjald á framleiðslu og innflutningi hava nevndu vørunummur omanfyri punkavgjald á 180 kr. pr. litur reint alkohol. Hetta er rætta avgjaldið, sum tað hevur verið síðani 2017. Ætlanin hevur ikki verið at broyta hetta avgjaldið.

Av onkrari orsøk er komið at standa 180,00 kr. pr. ltr. í punkt avgjaldi fyri hesi vørunummur í uppskotinum til løgtingslóg, sum landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hevur lagt fyri Løgtingið.

Við hesum broytingaruppskoti verður mistakið rættað, við at broyta punkt avgjaldið fyri hesi vørunummur í uppskotinum til 180 kr. pr. litur reint alkohol, sum er punkt avgjaldið í dag.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið er liður í eini skattaumskipan hjá landsstýrinum. Endamálið við lógini er at fáa pening til vegar fyri at fíggja skattaumskipanina.

Ætlanin við hesum lógaruppskotinum er at áleggja eitt avgjald á innflutning av F-gassi, ið skal geva landkassanum eina inntøku á 10-15 mió. kr. til komandi ár. F-gass er í køliskipanum, ið verða nýttar m.a. av skipum og handlum.

Tað skerst ikki burtur, at hetta avgjaldið er enn ein steinur oman á byrðu hjá vinnurekandi. Í hesari tíð við stórum prís- og rentuhækkingum, so raka avgjøldsuppskotini hjá landsstýrinum meint.

Fyri vinnulív á landi, so brúka m.a. handlar køliskipanir við F-gassi, og er tað komið fram undir nevndarviðgerðini, at avgjaldið fer at raka her, og serliga teir smærru handlarnar, ið ikki hava ta stóru fíggjarligu orkuna. Ásetingin av hesum avgjaldinum kann tí eisini hava við sær, at kostnaðurin verður fluttur út til brúkaran, og tí elvir hetta til enn størri prísvøkstur, sum hægru oljuavgjøldini eisini hava við sær.

Hetta uppskot rakar eisini hart í fiskivinnuni, har einstøk skip fáa eina rokning uppá fleiri hundraðtúsund krónur, orsakað av hesum uppskoti. Tá tosað verður um, at hetta er ein liður í at eggja vinnuni at velja aðra køliskipan, metir minnilutin ikki, at hetta er ein gongd leið at fara. Longu frammanundan er ásett við kunngerð, at innflutningur av F-gassi skal tálmast yvir eitt áramál, og tí er neyðugt hjá øllum at fremja eina íløgu í eina aðra køliskipan.

Breið semja er um, at F-gassini eiga at verða burtur innan ávíst áramál og tilgongdin er longu byrjað, bæði á sjógvi og landi. Hetta er eisini í samsvari við veðurlagspolitikkin, sum greitt sigur, at F-gassini eiga nærum at vera burtur í 2036. Í veðurlagspolitikkinum verður harumframt mælt til at áseta avgjald á F-gass, men minnilutin metir ikki, at rætt er at gera tað beint nú, tá vit í føroyska samfelagnum eru ovbyrjað av høgum prísum og stórum rentuhækkingum. Heldur eiga vit at taka spurningin upp aftur, tá prísvakstrar- og rentustøðið aftur verður meiri vanligt.

Hetta uppskot er ein liður í fíggingini av skattaumskipanini. Tó má spurnartekin setast við, um fíggingin veruliga er til staðar yvir ár. Longu sum nú er, er ein kunngerð lýst, ið ásetur, at innflutningur

av F-gassum skal tálmast yvir eitt áramál og bannast í 2036. Í takt við, at fyritøkur leggja um til aðrar køliskipanir, gjalda tær heldur ikki avgjald longur. Tí kann staðfestast, at hendan inntøkan verður vekk eftir nøkrum árum, møguliga áðrenn 2036.

Tað er ein kostnaðarmikil íløga at fremja, og er tað ikki tann parturin av vinnuni – hvørki á sjógvi ella landi – ið forvinnur mest, sum skal undir hesa tilgongd. Tí er avgjaldið ein stórur steinur omaná byrðu í hesi tilgongd og kann í veruleikanum seinka hesum skifti frá dálkandi F-gassum til umhvørvisvinarligari evni.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	